Eftir tvær langar og krevjandi konsertferðir við nógvum góðum upplivingum, dyggum pallroyndum og góðum ummælum er kósin sett hjá garpunum úr víkingmálms bólkinum Týr. Týr er veruliga klárur at gera um seg kring heiminum.


Mynd: Bárður Eklund

# SMÍÐA MEÐAN JARNIÐ ER HEITT

SAMRØÐA
**Fróði Stenberg**
post@sosialurin.fo

Klokkan er umleið 13:00, tá eg seti kósina oman móti farstøðini, har eg og Heri Joensen úr Týr hava avgjørt at fáa okkum eitt lítið prát um støðuna hjá Týr. Vit hava góðar 40 minuttir til Heri skal við bussinum norður aftur. Vit sessast við eitt borð tætt at kioskini. Heri drekkur cola og eg kaffi.

## Progressivt Ragnarok

Fjepparar og blaðfólk hava tikið væl ímóti nýggjastu fløguni hjá Týr, Ragnarok. Men hvussu er Heri nøgdur, nú eitt sindur er fráliðið.

– Kanska er hon ov progressiv í løtum. Vit hava havt trý ár til at smíða fløguna saman, og tað hevur gjørt tað møguligt hjá okkum at leggja nógv smá ting aftrat løgunum. Hetta ger at tað tekur longri tíð til, at alt gongur upp fyri lurtaranum. Eg eri sera glaður fyri Ragnarok, men har eru nøkur hugskot, ið virkaðu ógvuliga gløgg, tá eg skrivaði tónleikin, men sum ikki riggaðu heilt álíkavæl.

Ummælarar hava nevnt tann progressiva hugin, ið bólkurin vísir á fløguni. Hetta hevur Heri tikið til sín sum íblástur. Tá hann einaferð skal til verka aftur til at smíða næstu Týr fløguna, ætlar hann at gera tingini á ein annan hátt.

– Eg kundi hugsað mær, at næsta fløgan bleiv meira live kend, soleiðis, at løgini ikki fingu sama progressiva tendens. Blivu uppaftur meira fangandi og veruliga fingu lív í til eina konsert .

## Víkingaferð ið gav bonus

Sum flestu fjepparum er kunnugt, so var Týr á einari longri konsertferð í Evropa saman við finska og sera episka bólkinum Wintersun og Amon Amarth, sum í nøkur ár hevur verið eitt tað størsta navnið innan víkingamálmin. Hvussu upplivdi Heri hesa drúgvu konsertferð?

– Vit hava bara jaligar søgur frá ferðini. Hetta var ein sera týdningarmikil rundferð fyri okkum og fyri yrkisleiðina hjá Týr. Vit vóru í Ungarn, Póllandi, Italia, Fraklandi, Onglandi, ja, runt í Evropa. Næstan hvørt kvøld spældu vit fyri umleið túsund fólkum. Serliga í Póllandi og Ungarn var móttøkan góð. Hetta tí, at konsertir av hesum slagnum ikki eru heilt vanligar har um leiðir og tí vóru reaksjónirnar orkumiklar.

At vera á konsertferð gevur møguleika, at skapa nýggj sambond og at fáa nýggjar vinir. Men at framføra so harðan tónleik hvørt kvøld, kennist aftur á kroppinum. Nógvu og longu bussferðirnar eru somuleiðis møðsamar.

– Vit deildu buss við manningina úr Wintersun, og prátaðu javnan við okkara víkingabrøður úr Amon Amarth. Tey flestu fólkini, ið tú hittir í hesum umhvørvinum, eru stás menniskju. Nógv ferðing var og tað kundi onkuntíð tykjast strævið. Konsertirnar vóru seint á kvøldi, og sjálvt um tað var ómetaliga gott at spæla fyri fólkum, so var eg útkoyrdur, tá dagurin var liðugur.

## Danish dynamite

Í ummæli her í blaðnum, varð ljóðmaðurin Jacob Hansen nevndur í samband við ummæli av Ragnarok, róð var framundir, at hann var eitt slag av uttanhýsis fimta limi. At tí at hansara áhaldandi leiklutur við at skapa ljóðbúnan hjá bólkinum og í síðsta enda samleikan á fløguni. Heri heldur, at tað kanska er at gera ov nógv av.

– Jakob er sera professionellur og læ̈ttur at arbeiða saman við. Hann ger nógv arbeiði fyri okkum, tá vit eru í upptøkuhøli ella ljóðblanda. Men hann hevur ikki beinleiðis ávirkan á sjálv løgini. Hann kemur við nøkrum hugskotum, eins og øll onnur, men blandar seg ikki ov nógv upp í sangskrivingina .

Sjálvur heldur Heri, at samstarvið við Jakob hevur riggað væl, tí er eisini møguleiki fyri, at Týr fara at samstarva við dananum á næstu fløguna.

## Konsertir í eygsjón

Týr skrivaði undir sáttmála við eysturríkska plátufelagið Napalm Records og við við umboðsfelagið Listen Up, tíðliga í fjør. Hetta hevur styrkt bólkin og gjørt tað læ̈ttari at sleppa fram at konsertum og festivalum í útlondunum.

– Vit fáa góðan stuðul og hava góðar treytir, so har er ikki nógv at klaga um. Nakrar konsertir eru fyri framan. Av tí at Amon Amarth skuldi til USA á aðra konsertferð, vórðu vit noyddir at útseta tær síðstu framførslurnar saman. Vit skulu spæla fýra konsertir í Svøríki og eina í Oslo. Hetta verður frá 31. januar til 4. februar. Samstundis verður arbeitt við øðrum konsertferðum. Alt er bara ikki komið uppá pláss enn. Vit skulu m.a. spæla á týska Ragnarok Festivalinum í mars og Wacken í august.

Wacken Open Air er heimsins størsti tungmálmsfestivalur. Hóast hetta ikki verður fyrr enn 4. august, spurdi eg Hera, um hann hevði gjørt sær nakrar tankar um hetta tiltak.

- Hetta er stórt fyri okkum. Tey siga, at spælir tú eina góða konsert á Wacken, so ber alt til aftaná. Ein úr plátufelagnum hjá okkum fortaldi, at hetta er fyrstu ferð, at eitt navn frá teirra bólkalista er komið so skjótt millum førandi nøvnini, sum enda á Wacken pallunum. Tað verður spennandi. Mær vitandi ætla nógv fólk at koma at stuðla okkum, bæði úr Føroyum og Holland, ja, líka úr USA.

## Nýggj fløga í 2008

Nú einans 10 minuttir eru eftir til Heri skal við bussinum, spyrji eg, nær næsta Týr fløgan kemur.

– Vit eru ikki byrjaðir uppá nakað. Ongin tíðaræætlan er sett, men eg kundi hugsað mær at farið í upptøkuhølið aftursíðst í hesum árinum, og geva fløguna út um várið komandi ár, men onki er avgjørt enn, so vit fáa at síggja, sigur Heri, reisist og biður farvæl og gongur út móti bussinum.